Gjaldstovan

Spurningar og svar til útboð av byggiharraráðgeva til Gjaldstovuna

Gjaldsstovan hevur fingið soljóðandi spurningar.

1. Kann ráðgevin ið vinnur uppgávuna sum byggiharraráðgevi, eisini prosjektera?
    a. Kann sama ráðgevarafyritøka sum verður byggiharraráðgevi hjá Gjaldstovuni, eisini prosjektera (evt. aðrir persónar). Hugsað verður her um alla prosjekteringstilgongdina, s.s. prosjektuppskot, myndugleikaprosjekt, høvuðs- og útbjóðingartilfar v.m.

    Svar:
    Endaliga støða er ikki tikin til henda spurningin. Fyrst og fremst ynskja vit ein byggiharraráðgeva, og so ynskja vit optión at kunna fáa fleiri tænastur. Hesar verða ikki vektaðar tá vit taka avgerð um hvør fær byggiharraráðgevara uppgávuna.

2. “Uppgávurnar”
    a. Tit skriva í útbjóðingartilfarinum, undir “Uppgávurnar”, at byggiharraráðgevin, saman við byggiharra skal gera útbjóðingartilfarið. Hvat meina tit við hesum?
        i. Er tað at skriva útboðsskrivið og samla prosjetktilfarið saman og senda til arbeiðstakarar at bjóða uppá, ella er tað eisini at prosjektera alt útboðstilfarið?
        ii. Ella er tað at bjóða prosjekteringina út?

    Svar:
    Hesin spurningur hongur saman um byggiharraráðgevin verður biðin at gera fleiri uppgávur enn bara byggiharraráðgevara uppgávuna. Gjaldstovan hevur avmarkaðan førleika innan bygging, og tí síggja vit fyri okkum at byggiharraráðgevin verður okkara fremsti ráðgevi, og fer at hjálpa okkum at velja bestu loysn. Vit hava ikki tikið støðu til hvør ger prosjektering. Tað fara vit at gera saman við byggiharraráðgevanum.

    b. Tit skriva “verða okkara ráðgevi mótvegis veitarum”
        1. Hvørjir eru hesir veitarar?
            a. Prosjekterandi ráðgevarar?
            b. Arbeiðstakarar?
            c. Onnur?

    Svar:
    Vit vita ikki enn hvørjir veitarar vit fara at hava. Fyrst skulu vit hava eina byggiharraráðgeva, og saman við honum fara leggja ætlan fyri hvussu vit fara fram.

3. Í Útbjóðingarskrivinum vísa tit til “Ydelsesbeskrivelser for Bygherrerådgivning 2018”, meðan tit hava viðlagt YBB2019. Hvat er galdandi?

    Svar:
    Tað er YBB2019 sum er rætt.

Gjaldstovan

4. Viðv. “”Afgrænsningsskema til YBB19”: Er ætlanin at umsøkjarin skal skal seta x í sambandi við innlating av tilboði, ella er hatta nakað byggiharri og byggiharraráðgevi gera í felag, aftaná at byggiharraráðgevin er funnin?

   Svar:
   Vit síggja fyri okkum at vit saman við nýggja byggiharraráðgevanum fara at útfylla Afgrænsningsskema til YBB19

5. Í útbjóðingartilfarinum verður víst til tveir bygningar, nevniliga Albert Hall á Argjum og "BAKS" í Klaksvík. Kunnu tit nærri lýsa, hvør bygningur talan er um í Klaksvík, herundir upplýsa adressu og møguliga nærri lýsing av ognini?

   Svar:
   BASK bygningurin liggur á Klaksvíksveg 78.

6. Undir døminum um góðskumeting verður nevnt, at dentur verður lagdur á "bestu skipanina". Kunnu tit útgreina, hvat tit í hesum sambandi leggja í hugtakið "skipan", og hvørji viðurskifti verða løgd dent á í metingini?

   Svar:
   Hatta er ein óheppin orðing. Tankin var at hatta skuldi vísa til at viðkomandi “hevði eina góða góðsku” soleiðis sum lýst í útbjóðingartilfarinum.

7. Verða byggileiðsla og HTÚ-samskipan fevnd av veitingini hjá byggiharraráðgevanum, ella verða hesar veitingar útbjóðaðar serskilt?

   Svar:
   Endaliga støða er ikki tikin til henda spurningin. Fyrst og fremst ynskja vit ein byggiharraráðgeva, og so ynskja vit optión at kunna fáa fleiri tænastur. Hesar verða ikki vektaðar tá vit taka avgerð um hvør fær byggiharraráðgevara uppgávuna.

8. Kunnu tit nærri lýsa væntaða uppgávu- og aktivitetsnøgdina fyrstu 12 mánaðirnar av sáttmálaskeiðinum?

   Svar:
   Vit hava avmarka av førleika innan bygging, tað er orsøkin til at vit skulu hava ein byggiharraráðgeva. Vit hava eisini avmarka av vitan um hvussu ein byggiharraráðgevi skipar sítt arbeiðið. Men vit skulu beinanvegin í gongd við arbeiðið at dagføra Albert Hall.

Gjaldstovan

9. Tilboðið skal upplýsa ein tímaprís fyri veitingina. Kunnu tit vátta, um tilboðsgevarar kunnu bjóða við ymiskum tímalønarsatsum fyri ymiskar starvsbólkar ella serfrøðingar (t.d. byggiharraráðgeva, byggileiðara, HTÚ-samskipara og serfrøðingar), ella um ein felags tímaprísur skal nýtast fyri alt arbeiði undir sáttmálanum?

   Svar:
   Vit biðja tímaløn til ein byggiharraráðgeva. Aðrar uppgávur eru optiónir, sum vit kunnu velja til ella frá.

04. november
Hallur Thomsen